


**Nr. 19** ***15. septembur 2024*** **84. árg.**

# Reinsaður frá synd

*„Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.“*
*1. Jóh. 1,7.*

Ein sera kaldan vetrardag gekk ein kona, sum hoyrdi til frelsunarherin, og gjørdi trúboðaragerning millum tey fátæku fólkini, sum búðu í einum tí versta býarpartinum í London. Í einum húsum við nógvum íbúðum gekk hon upp gjøgnum eina mongd av trappum, so fór hon frá hurð til hurð og bankaði uppá. Summstaðni vóru tey ógvuliga ófólkalig og við grovum orðum sýttu tey henni atgongd. Nøkur fá lótu hurðina upp og góvu henni loyvi at koma inn og siga søguna um Jesus.

So kom hon til ta síðstu av nógvum, nógvum hurðum og bankaði uppá har. Tá fór hurðin nakrar fáar tummar upp og ein tjúkkur maður spurdi ilskliga: „Hvat vilt tú?“

„Eg eri ein, sum arbeiðir fyri Kristus,“ svaraði hon, „og eg beri tey góðu frelsutíðindi.“

„Far burtur hiðani. Vit hava ikki brúk fyri tær her.“

Trúboðarin vendi sær við og ætlaði sær at fara, men steðgaði á, tá ið hon hoyrdi eina veika rødd tosa.

„Á, góði lova henni inn. Eg má síggja hana. Send hana ikki burtur.“

Maðurin fekk ikki staðið ímóti bønini hjá sjúku konu síni. Tvørur læt hann hurðina upp, og trúboðarin steig innum. Hon sá eina konu, álvarsliga sjúka, sum lá í einari hoyrúgvu.

„Á tygum,“ stunaði konan, „vita tygum nakað um blóðið, sum reinsar frá synd?“

Trúboðarin var stórliga bilsin.

„Hvar hava tygum hoyrt um tað?“

„Tað minnist eg ikki rættiliga. Men einaferð fyri árum síðani, fór eg inn í eina kirkju og hoyrdi onkran tala og syngja um blóðið, sum reinsar frá allari synd. Eg havi brúk fyri hasum blóðinum, tí eg havi verið ein syndari, og eg vil verða rein."

„Jú, eg kenni mannin, hvørs blóð reinsar," svaraði konan, sum var komin á gátt.

So tosaði hon eymliga um mannin, sum av fríum vilja gav lív sítt, so at allir syndarar kunnu verða reinsaðir. Hon bað fyri tí sjúku konuni og fyri manni hennara og lovaði teimum læknahjálp.

Við trúgv tók konan ímóti ofrinum, sum varð gjørt hennara vegna, og eitt yvirbragd av friði kom í móðu eygu hennara.

„Eg eri ikki bangin longur," segði hon og tók í hondina á trúboðaranum. „Eg eri so glað, tí tygum komu. Farið nú skundisliga og sigið hesi góðu tíðindi fyri øllum."

*„Reach out" 3. mai. - Effie Campbell* umsetti.

# Tíðin gongur

Klokkan slær - tíðin fer, syngja vit. Ja, klokkan dikkar og gongur allar tíðir á samdøgrinum og minnir okkum á, at tíðin, tað dýrabarasta av øllum, skundisliga rennur frá okkum. Teir stillu náttartímarnar er tað, eins og hon ger gongdina á tíðini, sum vit annars ikki varnast, hoyrandi. Nei, eingin sleppur undan at leggja merki til, hvussu skjótt tíðin gongur. Og tað gerst alt skilligari fyri okkum, jú eldri vit gerast, og minnir okkum á, hvussu álvarsligt lívið er.

Á morgni sigur sálmaskaldið, eru tey (menniskjuni) sum tað grøna grasið, á kvøldið følnar tað og doyr. Sálm. 90,6. Lívið hjá menniskjunum her á jørð er sanniliga ómetaliga stutt og verður í hesum sálmi sammett við tað stokkuta lívið hjá grasi. Og henda so ofta brúkta sammetingin er ikki bara ein skaldslig málbering, men er ramur veruleiki. Eingin kann ganga gjøgnum skógin á heysti uttan at koma at hugsa um, hvussu stutt lívið er, tá ið tey síggja øll tey følnaðu bløðini, sum falla til jarðar. Tað ger okkum sorgarbundin at hugsa um, at alt tað vakra í náttúruni skal følna og doyggja, men samstundis talar tað eitt álvarsligt orð til okkara. Tí júst soleiðis er mannalívið.

Prædikarin, sum av royndum visti, hvussu skjótt tíðin gongur, minnir menniskjuni á at geva sær far um tíðina, so

hon ikki rennur frá teimum uttan at verða brúkt til tað, sum hon er ætlað til. Hann sigur so vakurt: „Hugsa um skapara tín í ungdóms døgum tínum“ – altso meðan tú hevur tíð til tað.

Ta tíðina, menniskju skulu liva á jørðini, hava tey eina stóra uppgávu í Guds ætlan. Tíðin skal vera ein royndartíð, so Gud kann síggja, hvat ið býr í hjørtum teirra og løna teimum eftir, hvussu tey hava umsitið gávu hansara.

*Effie Campbell* umsetti.

# Dólskni førir til deyða

Í kommunistatíðini var Aril Edvardsen einaferð yviri í Russlandi og prædikaði. Ein russi, sum var tolkur hansara, fylgdist allan vegin við honum yvir til Vladivostok. Tá ið teir skuldu skiljast, kom ein neyð niður yvir Aril fyri hesum ófrelsta manni. „Hetta verður helst síðstu ferð, at eg síggi hann. Eg má siga okkurt við hann,“ hugsaði hann.

„Hevur tú hoyrt um Nóa?“ spyr Aril so. Jú tað hevði hann.

„Veitst tú, at Nóa læt byggja eina ørk?“ Ja, tað visti hann.

„Allir timburmenninir, sum hjálptu Nóa at smíða ørkina, hoyrdu hann prædika øll árini, til ørkin stóð liðug. Men eingin teirra tók við ávaringini og boðskapi hansara. Tvørturímóti hildu teir hann vera ein ørvitisknokk, sum smíðaði eitt so stórt skip so langt inni í landinum, og teir flentu at honum. Tískil druknaðu allir teir, sum høvdu hjálpt honum at smíða. – Nú hevur tú ferðast um alt landið og hoyrt meg prædikað. Tað er ikki nóg mikið at hoyra og duga boðskapin uttanat. Tú mást gera okkurt við tað. Tú mást bjóða Jesusi at koma inn í títt hjarta. Hann er okkara frelsandi ørk. Gert tú ikki tað, so verður tað við tær sum við smiðunum á Nóa døgum.“

Hvussu tað bleiv við hesum tolkinum, veit eg ikki. Men Jesus ávarar okkum. „Sum tað var á Nóa døgum, skal tað verða í endatíðini,“ segði hann

Vit bíða eftir burturrykkingini. „Eingin burturrykking hevur nakrantíð verið fyrr,“ flenna fólk speirekandi.

Jú, Enok varð burturryktur, og Elia varð burturryktur, og skjótt kemur triðja burturrykkingin, tá ið øll tey trúgvandi verða tikin burtur av jørðini, og tá verður tað ikki stuttligt at vera latin eftir, tí tá kemur ein trongdartíð, sum henda verð ongantíð hevur sæð makan til.

Men enn er náðitíð, og enn er frelsudagur, og Skriftin sigur, at um tú hoyrir Harrans kallandi rødd, so skalt tú taka ímóti honum í dag.

Tá kemur tú, andaliga talað, at búgva á Rómerjavegi nr. 8 í fyrstu hædd, tí: „So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi.“ Róm. 8,1.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hon lýsti

*„Tit eru ljós heimsins... Soleiðis lýsi ljós tykkara fyri fólki.“*
*Matt. 5,14. 16.*

Eini trúgvandi hjún koyrdu gjøgnum Gudbrandsdalin. Tey skuldu norðureftir at halda møti. Tey høvdu altíð hoyrt, at lítið andaligt lív var í hesum dali.

Tá ið tey vóru inni á eini bensinstøð, spurdi maðurin: „Er tað eingin, sum rekur nakað andaligt virksemi her í dalinum?“

„Jú,“ varð svarað, „ein kvinna heldur møti ovast uppi í dalbotninum, 50 míl hiðani.“

Tá ið tey komu norður hagar, funnu tey skjótt kvinnuna. Hon hevði fingið nakrar skótar at hjálpt sær at sett upp eitt tjald, sum rúmaði 50-60 fólkum. Har stóð henda einsliga kvinnan við einum gittara og spældi og sang einar 4-5 sangir, talaði orðið og sang at enda einar tveir sangir. So fóru tey, ið inni vóru, og onnur komu inn. Konan gramdi seg fyri teimum: „Eg eri púra einsamøll og havi ongan at hjálpa mær. Eg kenni meg so móða og lítisverda!“

„Sig ikki tað,“ segði maðurin, „tað er grúiligt, sum tú lýsir bjart. Skinið frá tær lýsir 50 míl suðureftir!“

„Hvat er tað, tú sigur?“ spurdi konan bilsin.

„Jú,“ svaraði hann, „tey verðsligu síggja tað skilliga. Vit vóru inni á eini bensinstøð 50 míl hiðani, og har vistu tey um títt andaliga virksemi. So halt endiliga á, strálurnar røkka langt!“

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 15. sept. | **Tekstur:** | Matt. 6,9 Jes. 6,1–7 | **Bíbliuorð:** | Fil. 4,6 |
| 22. sept. | **Tekstur:** | Matt. 6,10a; 13,4–9 + 19–23 | **Bíbliuorð:** | Mark. 1,15 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 20** ***29. septembur 2024*** **84. árg.**

# Halló! Tak tær um reiggj!

*„Havið ikki tílíka umsorgan fyri holdinum,*
*at tað elvir girndir.“ Róm. 13,14.*

„Eg haldi eyga við mínum hjarta, eg havi altíð eygu míni opin ...“, er tað onkur, sum syngur. Hatta er ein góður sangur, og hatta er ein enn betri teologi! Tað er tápuligt at gera tað, sum hini gera, og vænta, at úrslitið verður betri. Tak tær um reiggj!

Dávid rann runt eftir konunum hjá øðrum, og tað endaði við, at hann fekk eina skitna samvitsku, ringt orð á sær, og hann oyðilegði lívið hjá tveimum familjum. Rým, meðan tú enn kanst!

Ljóðar hatta gamalsligt? Royn at tosa við onkran av teimum, sum tú helt „slapp gott frá tí“. Tey hava goldið upp á mangar so ótespiligar mátar, at tey ikki vilja tosa um tað. So sum:

1. **Ótta:** „Tað, ið gudleysur óttast, kemur yvir hann.“ Orðt. 10,24.
2. **Álitisbrot:** „Um hjarta okkara ikki dømir okkum, tá hava vit frímóð fyri Gudi.“ 1. Jóh. 3,21.
3. **Angur:** „Eg havi verið ein dári og eri farin langt av leið!“ 1. Sám. 26,21.

Sálomon hevði alt! Eitt heim, sum tað tók 13 ár at byggja, 40.000 hestastallar, ein skipaflota, túsund vakrar konur, og hann átti meir av peningi, enn hann hevði kunnað brúkt, um hann hevði havt tíggju lív!

Og kortini var endin tann, at hann vendi Gudi bakið. Hann vendi eisini øllum teimum ráðunum, sum hann sjálvur hevði

givið øðrum, bakið. Hví? Tí honum vantaði sjálvsaga, hann hevði ikki tamarhald á sær sjálvum. Her tekur hann samanum lív sítt:

**a)** „Eg noktaði ikki hjarta mínum nakra gleði.“ Præd. 2,10.
**b)** „Og mær leiddist við alla møði mína, sum eg havi møtt meg við undir sólini.“ Præd. 2,18.
**c)** „Betri er fátækur og vitur unglingi enn gamal og fávitskutur kongur, sum ikki longur dugir at taka við ráðum.“ Præd. 4,13.

**Halló! Tak tær um reiggj!**

*„...et Ord til Dagen“. – Effie Campbell* umsetti.

# Sagt um bøn

- Biðið, so skal tykkum verða givið. (Matt. 7,7).
- Bønin hjá einum rættvísum hevur eina ómetaliga styrki í sær. (Ják. 5,16).
- Bøn er ein verndarskotríð („spærreild“)
- Bøn flytur fjøll.
- Tann, sum biður, nemur við ta hondina, ið stýrir alheiminum.
- Tá ið tú arbeiðir, arbeiðir tú. Tá ið tú biður, arbeiðir Gud.
- Alt tað, sum tit biðja um í bønini við trúgv, tað skulu tit fáa. (Matt. 21,22).
- Tit hava ikki, av tí at tit ikki biðja. (Ják. 4,2).

**Hví biðja vit so ikki?**

*Effie Campbell* umsetti.

# Fyrigev og kom víðari

*„Umberið hvør annan og fyrigevið hvør øðrum, um einhvør hevur kærumál móti einumhvørjum; eins og Kristus fyrigav tykkum, soleiðis eisini tit!“ Kol. 3,13.*

Nakrir læknar blivu spurdir, hvørjar kenslur elvdu til flestar kropsligar sjúkur. Svarið var „vreiði og hetta ikki at vilja fyrigeva“, tí við tíðini loysa hesar kenslur eitrandi toksinir út í kroppin. Tí sigur Paulus: „Latið ikki sólina seta yvir vreiði tykkara.“ (Ef. 4,26. V.D. ums.) Íðan, hvat skalt tú so gera, um tú hevur fingið eina órættvísa viðferð? Hugsa um hetta!

Uppgerð! Tað finst ein røtt løta til tess. Áðrenn tú gert tað, skalt tú biðja Gud leiða tínar tankar og tíni orð. Og sig so tað, sum tú meinar – uttan at ljóða dømandi ella at hava tikið eina støðu frammanundan. Síðani skalt tú lata restina yvir til Guds. Hann dugir betur at broyta viðurskiftini, enn tú dugir.

Slepp tí! Gud biður okkum ikki bara fyrigeva hvør øðrum. Hann gevur okkum eisini náði at gera tað. Tú letur onkran sleppa; men tað merkir ikki, at Gud ger tað sama. Hann tekur sær av teimum, og hann fær tað rætta úrslitið. Og tað ert tú als ikki førur fyri at fáa.

Minst til allar tær ferðirnar, Gud hevur fyrigivið tær! Paulus sigur, vit skulu fyrigeva, eins og Gud fyrigav okkum. Tá ið tú verður freistaður at sleikja tíni sár ella at sláa aftur, minst so til tann prísin, Jesus rindaði fyri syndir tínar. Við tí áskoðanini er altíð rúm fyri fyrigeving.

Bið fyri honum, sum ger seg inn á teg! Fyrigeving merkir, at tú ikki skalt lata hin halda á at særa teg. Gud segði: „Elskið fíggindar tykkara og biðið fyri teimum, ið forfylgja tykkum.“ Matt. 5,44. Uttan náði verður lívið ein long og endaleys ringrás av hatri og hevnd. Men tá ið tú gongur í Guds kærleika, fert tú at uppliva frælsi.

*„...et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Nýtt lív í missiónshúsini

**Visjon Norge sendi frá norsku mansstevnuni 2017. Har kom ein maður og bar fram vitnisburð sín:**

„Tað savnaðust so fá fólk í missiónshúsinum hjá okkum, og nevndin hevði tí biðið prest seta missiónshúsið til sølu. Tá fekk kona mín eitt orð frá Harranum: „Tit skulu ikki selja húsið. Eg skal skapa veking. Húsið skal fyllast aftur, og nógv bøn skal vera har.“

Tá ið hon segði mær hetta, segði eg, at hon mátti siga tað við prest. „Eg tori ikki,“ svaraði hon. „Jú, tað mást tú,“ segði eg, „tí vit hava lovað, at vit altíð skulu vera Gudi lýðin.“

„Ja, eg skal siga tað við hann, men so má Harrin leggja tað so til rættis, at tað verður ein lagalig løta, har einki órógvar okkum.“

Stutt eftir skuldi kona mín á ein fund, og prestur kom at sita undir liðini á henni. Tá var hin lagaliga løtan, og kona mín fekk sagt tað, sum Harrin hevði givið henni at siga.

Og hvussu gekst so við missiónshúsinum? Jú, tað varð ikki selt, veking kom, og húsið fyltist við fólki. Nógv verður biðið, og vit uppliva undur. Til dømis var tað ein kona, sum gekk á møti í missiónshúsinum, sum gjørdist álvarsliga sjúk. Hon fór á sjúkrahúsið og doyði. Hon fór úr likaminum og til himmals. Har tosaði hon við Jesus, sum segði: „Tú skalt ikki doyggja nú, tú mást fara niður aftur á jørðina, tí har hevur tú arbeiði at gera fyri meg." Og so varð!

Hetta vitni eg, tí eg vil gera navn Harrans stórt. Skriftin sigur: „Eg vil Harranum lova av øllum hjarta mínum, um øll undurverk tíni vil eg boða. – Gerið kunn millum manna hans stórverk!" Sálm. 9,2 & 12. Ja, vit hava fingið boð um at boða frá stórverkum hansara, og eg vil ikki leggjast á boðini," endaði maðurin vitnisburð sín.

*Effie Campbell.*

---

**Tað eru bert tvær herdeildir:** annaðhvørt eru vit ein Jesu Krists stríðsmaður og tæna honum, ella eru vit í herliði Satans.

*e.c.* ums.

---

**Hoyr hesi lívsælu orðini:** „Tí at Kristus er endin á lógini til rættvísi fyri hvønn tann, sum trýr." Róm. 10,4.

*e.c.* ums.

---

**Bið til Gud.** Bið hann vísa tær vegin. Tosa við hann, sum var hann **faðir** tín!

*e.c.* ums.

---

Ísrael er eitt slag av einari myndabók upp á tann sannleikan, at tað, sum er ógjørligt hjá menniskjum, er gjørligt hjá Gudi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. sept. | **Tekstur:** | Matt. 6,10b; 26,36–39 | **Bíbliuorð:** | Sl. 37,5 |
| 6. okt. | **Tekstur:** | Matt. 6,11+33; 2 Mós. 16,1–36 | **Bíbliuorð:** | Matt. 6,33 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74